# Í prestakjóla á



Henning Bøgesvang, prestur, koyrdi lastbil og legði av at roykja longu sum sjey ára gamal. Í opinskáraðum práti fortelur hann millum annað um ferðina, hann koyrdi í kapellið á motorsúkklu í prestakjóla og um mangar aðrar stuttligar hendingar

Bøgesvang, sum presturin í Sjóvar prestagjaldið oftast verður nevndur, er nú vorðin 66 ára gamal, og hevur upplivað nógv í sínum lívið sum sjómansprestur og sóknarprestur. Men hann upplivdi sanniliga eisini nøkur ting, áðrenn hann gjørdist prestur, og upprunaliga ætlanin var ikki, at gerast prestur. Hann vildi verða jetpilotur, og hetta hevur kanska sett síni spor hjá skemtingarsama prestinum.

Eitt nú hevur hann altíð verið glaður fyri akfør. Í eina tíð tók skuldi hann ansað eftir motorsúkkluni hjá einum vinmanni, sum av onkrari orsøk ikki kundi hava hana. Tá var tað, at hann koyrdi á motorsúkklu í prestakjóla.

– Eg hevði eini ørindir á kapellinum á sjúkrahúsinum í Klaksvík. Sólin skein, motorsúkklan og bilurin stóðu lið um lið í túninum. So eg tók bara motorsúkkluna. Eg skilji væl, at summi blivu eitt sindur kløkk, og kanska ikki tóku tað so væl upp, men við hvørt gera vit ting, sum vit ikki kunnu greiða frá. Kanska bara tí tað er stuttligt, greiðir presturin frá. Hann fortelur eisini, at hetta ikki var hansara seinasti túrur á motorsúkklu, tí hann hevur ofta koyrt til Viðareiðis á motorsúkklu at halda gudstænastu, men tá koyrdi hann ikki í prestakjóla.

## Legði av at roykja sum sjey ára gamal

Henning Bøgesvang vaks upp í Skanderup við Kolding í Danmark. Pápin hevði lastbilar og mamman var heimagangandi. Í heiminum búðu, umframt tey seks systkini hjá Henning, eisini bilførararnir hjá pápanum, so hetta við bilum hevði stóran týdning í uppvøkstrinum hjá Bøgesvang.

– Tað var kanska nokk so ópedagogiskt. Men pápi lærdi meg tíðliga at koyra lastbil og at roykja. Tá eg byrjaði í skúla, sum sjey ára gamal, mátti eg gevast at roykja, tí tað slapp mann ikki í skúlanum, sigur presturin.

– Einaferð vóru vit í einum Ford lastbili við skermum á síðuni. Tveir kammeratar hjá mær lógu á teimum, og pápi stóð uppi í lastini. Eg koyrdi bilin, tá politii kom yvir til bilin, tí hesir kammeratarnir lógu á skermunum, meðan vit koyrdu. Politistarnir spurdu, hvør koyrdi bilin. Pápi var í lastini og kundi onki siga. Tá teir so sóu meg inni á førarasetrinum, spurdu teir, hvussu gamal eg var. Eg minnist so týðiliga, at eg svaraði, at eg var sjey ár, flennir Bøgesvang.

## Koyrdi turistbuss

Árini Bøgesvang las til prest, koyrdi hann turistbuss í Evropa í summarfrítíðini. Á hesum túrum upplivdi hann nógv. Ofta gekk bilurin fyri, og tá vóru hini bilførararnir skjótir at arga.

– Hevur tú ikki Gud við tær, spurdu teir, tá bilurin gekk fyri, flennir Bøgesvang og leggur afturat, at tað ikki altíð var galið við bussinum, hóast tað sá soleiðis út.

– Eg minnist einaferð, vit vóru í Køln. Fólkini skuldu síggja dómkirkjuna, og tað var so langt til parkeringsplássini. So eg steðgaði bara beint uttanfyri kirkjuna, og loysti luftskrúvuna, so bussurin ikki fekk koyrt. Beinanvegin kom politiið og bað meg flyta bussin. Men eg segði við teir, at eg slapp ongan veg, tí okkurt var galið við bussinum. Men eg stóð og forðaði ferðsluni, søgdu teir. Eg fór so út og skrúvaði luftskrúvna soleiðis, at eg akkurát kláraði at flyta bussin nakrar metrar fram. Tá vóru teir so øgiliga takksamir, tí eg hevði flutt bussin. Tá ferðafólkini komu útaftur, setti eg lufskrúvuna upp á pláss, og so koyrdu vit avstað.